


*Nr. 17* **15. august 2021** *81. árg.*

# Hvat hevur tú?

Uttan mun til, hvussu lítið tú heldur, at tú hevur, gev so Gudi tað. Eingin sum Hann kann fáa okkurt stórt burtur út tí, sum lítið er. Móses bleiv kanska størsti leiðarin nakrantíð, tá ið hann í 40 ár leiddi jødiska fólkið gjøgnum oyðimørkina til Lovaða Landið.

Hetta var ein ferð við nógvum trupulleikum, men tað var eisini ein ferð við dagligum undrum, har tey fingu mat, vatn og skógvar og klæðir, sum ikki slitust. Tey fingu ein eldstólpa at hita seg við um náttina – og eitt skýggj at verj seg móti sólarhita um dagin. Móses man hava hugsað aftur á tann dagin, tá ið hann móður, vónsvikin, gamal og málleysur stóð við stavi sínum framman fyri Gudi. Tað var har, at ferðin við øllum undrunum byrjaði:

Vil tað siga, at Gud brúkar ikki menniskju, sum hava høga útbúgving við nógvum førleikum at bjóða Gudi? Jú, sanniliga, Gud brúkar øll sløg av menniskjum. Men Gud vil ofta gera okkurt við tað menniskjað, sum hevur nógvar førleikar, so hann ella hon ikki lítur á sínar førleikar, men á Gud.

Gud kundi havt kallað Móses, tá ið hann var 30 ár, ungur, sterkur og væl skúlaður í hovinum hjá Fárao. Men Gud bíðaði, til Móses var 80 ár og næstan liðugur. So vísti Gud, hvat ið Hann kann gera gjøgnum eitt sovorðið menniskja.

Saulus hevði høga útbúgving, ágrýtni og karismu. Men Guds kall til hansara, tá ið hann seinni fekk navnið Saul, gekk hond í hond við, at Himmalsins ljós myndaliga talað brendi Paulusar kunnleika og religión burtur. Frá tí løtu hevði Paulus

bara eitt ynski: At kenna Kristus – og at gera Hann kendan. (Les. Áps. kap. 9 og Fil. 3,1–11).

Tá ið Saul úr Tarsus byrjaði sín ríðitúr til Damaskusar at seta tey kristnu í fongsul, var hann lærdur, erpin og hevði stórt sjálvsálit og var braneggjaður. Tá ið hann møtti Guds ljósi á ferðini, fall hann á knæ ræðslusligin og blindur – og í máttloysi bleiv hann eitt undurfult amboð í Guds hond. Hann skrivaði uml. 28% av Nýggja Testamenti.

*Effie Campbell* umsetti.

# Orð okkara hava skapandi megi

*„Deyði og lív hevur tungan í valdi sínum, og tann, ið fegin nýtir hana, skal eta ávøkst hennara.“ Orðt. 18,21 V.D.*

Orð okkara kunnu sammetast við fræ, og tey hava stóra kraft. Tá ið vit siga tey, fara tey niður í undirvitskuna, har tey festa røtur og framleiða frukt eftir sínum slagi. Bæði jalig eins væl og neilig orð festa røtur og vaksa. Eftir eina tíð kemur fruktin: neilig ella jalig frukt.

Í Bíbliuni verður tungan samanborin við róðrið á einum báti. Tað merkir, at leiðin í okkara lívi verður stýrd eftir tí, vit siga. Um vit alla tíðina klaga og grenja, tala vanvirðisliga um lív okkara og lívið hjá øðrum, fær tað neiligar fruktir. Mong skilja ikki, hví lívið kemur við so nógvum neiligum upplivingum. Kunnu tær vera ein frukt av orðum okkara?

Vit fáa tað, vit játta. Hetta gerast sjálvuppfyllandi profetiir. Neiligar hugsanir leiða til neilig orð, og neilig orð leiða til neiligar gerningar. Steðga hasum neiliga snyrlinum, hasari óhepnu ringrásini í dag!

Míni ráð eru: snara lívsskútuni við at tala jaligt um lívið og um onnur. Sjálvt um tú hevur upplivað nógv neiligt og hevur orsakir at klaga, lat so tað ónda liggja. Neilig orð ala av sær uppaftur meira neiligar kenslur. Tað veksur bara og blívur uppaftur verri.

Sterkasta jaliga fruktin, vit kunnu fáa í lívi okkara, er at fara undir at játta lyftini í Guds orði. Les tey, hugsa og grunda um tey, og sig tey hart – umaftur og umaftur. Lat Guds orð gerast ein partur av lívi tínum, lat Guds orð einsamalt vera róðrið í lívi tínum. Bíblian sigur, at Guds orð eru „lív fyri teimum, ið finna tey, og heilsubót fyri alt teirra likam.“ Orðt. 4,22.

Í dag skalt tú fara undir at planta jalig trúarfræ, sum geva heilsubót inn í tína støðu og inn í títt sjúka likam. Tá ið ein tíð er farin, kemur heystið: „Heilsubót fyri alt títt likam!“

*Effie Campbell* umsetti.

# Støddin hevur einki at siga

Í Markus 16,2–4 lesa vit um tær tríggjar kvinnurnar, sum vóru á veg til grøvina hjá Jesusi. Á leiðini tosa tær sínámillum um, hvør ið skal velta steinina frá gravarmunnanum, tí at hann var ógvuliga stórur. Eg havi lisið mær til onkustaðni, at slíkir gravarsteinar vigaðu hálvt annað tons. Tað var ikki smávegis. Konurnar høvdu ongan livandi møguleika at vika handa steinin. Men tá ið tær komu leiðina fram, var steinurin veltur frá. Gud hevði verið undan teimum og greitt henda trupulleikan.

Hasin steinurin er ein mynd upp á okkara trupulleikar. Øll hava vit kvalir og trupulleikar, eingin sleppur undan. Flest øll menniskju eru fitt, um vit biðja tey hjálpa okkum, so vil meginparturin siga ja. Tað er bara tað, at menniskjans armur røkkur so stutt. Gud er hin einasti, sum kann loysa trupulleikar til fulnar. Tá ið hann hjálpir okkum, er trupulleikin bæði væl og virðiliga loystur, og vandamálið tikið upp við rót.

Fyri einum 35 árum síðani var Johan Maasbach, evangelistur úr Hollandi, í Føroyum. Hann segði m.a. frá einari hending, sum mamma hansara hevði upplivað:

„Tá ið mamma var 85 ár, hevði hon trupulleikar við gallbløðruni. Hon hevði gallsteinar. Læknin segði: „Tygum mugu leggjast undir skurð.“

Mamma fór so til hús og inn á kamar sítt, har hon hevði sín bønarkrók, eitt stað, har hon altíð bað. Hon lyfti hendurnar upp og segði: „Faðir! Eitt rennur mær í huga. Tá ið kvinnurnar gingu til grøvina, tosaðu tær hvør við aðra um, hvør ið skuldi rulla steinin burtur. Men tá ið tær komu leiðina fram, var steinurin longu rullaður til viks. – Gud mín, hvat hava hasir lítlu steinarnir, sum eg havi, at týða fyri teg. Harri, tak teir burtur.“

Og Harrin tók teir burtur. Seinni spurdi onkur: „Frú Maasbach, hvat hendi við hasum steinunum?“ – „Eg veit ikki, og eg leggi heldur einki í tað, tí eg eri grødd,“ svaraði mamma. „Kanska eru teir upploystir, líka veit eg.“

Men hon hevði ongantíð aftur trupulleikar við gallinum. Hon livdi, til hon var 102 ára gomul.

*Effie Campbell.*

# Húsini

„Vit eru yviri í Noregi á hvørjum sumri, av tí at ein dóttir okkara er gift har," vitnaði ein maður niðri á Blákross Kaféini. „Har vóru tað eini hjún, sum vórðu nógv umtalað. Fyri árum síðani livdu tey eitt vilt lív við rúsevnum, og av tí at tey ikki áttu pengar at keypa hesi evnini fyri, gjørdust tey krimenell, og tað gekk støðugt niður á bakka fyri tey. Endin varð, at tey fingu ein harðan dóm. Hvussu nógv ár, ið tey skuldu sita, veit eg ikki; men tá ið tað bara vóru tvey ár eftir, til tey høvdu sitið dómin, blivu tey frelst. Tað er eitt stórt arbeiði, sum summi fólk gera, tá ið tey fara inn í fongslini at syngja og vitna fyri fangunum. Hesi bæði blivu púra umbroytt og fingu eitt nýtt lív.

Tá ið tíðin nærkaðist, at tey skuldu gerast frí, fóru tey av álvara at stúra fyri at koma út aftur í samfelagið, tí tey áttu snøgt sagt einki. Hvussu skuldu tey fáa tak yvir høvdið? Men nú høvdu tey lært, at tá ið tú fært trupulleikar, so skalt tú fara í bøn til Gud og siga honum alt, akkurát sum tað er, og tað gjørdu tey. Tey vóru áhaldandi í bønini.

Eina náttina droymir konan, at hon sær eini stór og prýðilig hús. Hon sær tey uttan, men hon sleppur eisini at síggja øll rúmini innan. Hon ger av einki at siga við mannin. So ganga einir fýra dagar, tá sigur maðurin: „Tú, tað er løgið, men eg droymdi í nátt, at eg sá eini stór og prýðilig hús!"

„Ert tú eisini sloppin at síggja tey?" segði konan bilsin.

Tey gjørdust so samd um, at tey skuldu taka hvør sítt pappírsark og fara inn í sín kliva, og har skuldu tey tekna húsini, sum tey høvdu sæð í dreymi. Tá ið tey komu út aftur, vísti tað seg, at báðar tekningarnar vóru akkurát líka.

Og hasi húsini eiga tey og búgva har í dag," endaði maðurin sín vitnisburð.

*Effie Campbell.*

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 22. august | Tekstur: Jóhs. 2,1-12 | bíbliuorð: Matt. 19,26b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 18* *29. august 2021* *81. árg.*

# Hvar hava vit trygd okkara?

Mong eru óviss um frelsuna. Tey spyrja: „Hvar er vegurin til Himmals? Hvar er vegurin til friðin?“ Jesus er Vegurin. „Jesus sigur við hann: „Eg eri Vegurin og Sannleikin og Lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær.“ Jóh. 14,6. Tað er bara ein vegur. Eingin sleppur til Himmals ella til Gud uttan um Jesus, tí hann hevur goldið fullan prís á krossinum fyri okkara frelsu.

Tá ið Pætur hevði hildið sína tiltiknu hvítusunnurøðu, spurdu menn eisini: „Hvat eiga vit at gera?“ Men Pætur segði við teir: „VENDIÐ um og ein og hvør tykkara lati seg doypa í navni Jesu Krists til fyrigeving syndanna.“ Áps. 2,38. Tá ið vit vilja liva fyri Jesus, so venda vit syndini og gamla lívinum bakið, tað síggja vit í t.d. hesum 4 skriftstøðunum: Matt. 3,2 – Matt. 4,17 – Mark. 1,15 – Áps. 3,19.

Tað er ein óndur Djevul og ein góður Gud. Vit liva enn í náðitíðini, men vit flyta okkum við fullari ferð inn í endatíðina, tað stendur óivað greitt fyri teimum flestu. Vit mugu vera týðilig, tá ið vit boða evangeliið. Tónarnir í evangeliibasúnuni mugu vera klárir.

Hvar hava vit so trygd okkara? Her er garantiið: „Tann, sum trýr á hann (Jesus), verður ikki dømdur. Tann, sum ikki trýr, er longu dømdur, við tað at hann ikki hevur trúð á navn hins einborna Guds sonar.“ Jóh. 3,18. Frelsan er ein gáva, sum vit skulu taka ímóti. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum (t.v.s. bjóðaðu honum inn í hjarta sítt), teimum, gav hann mátt (ella rætt til) at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara.“ Jóh. 1,12.

„Hvør tann, sum ákallar navn Harrans, skal verða frelstur." Áps. 2,21 og Róm. 10,13.

Tá ið tú sigur nei til Jesus, sigur tú nei til Himmalin, til fyrigevingina og til æviga lívið. Hann tók tína revsing, tá ið hann hekk á krossinum. „Tann, sum hevur sonin (Jesus), hevur lívið; tann, sum ikki hevur Guds son, hevur ikki lívið." 1. Jóh. 5,12. Tú hevur einki garanti fyri morgindegnum. Hvar ætlar tú tær at vera í ævinleikanum? Míni ráð til tín eru:

*Kast dig i frelserens arme,*
*læg dig til ro ved hans bryst!*
*Hør, hvor det stormer derude!*
*Her er der fredfyldt og tyst.*

*Effie Campbell.*

# Jábez

*„Jábez ákallaði Ísraels Gud..." 1. Krýn. 4,10.*

Í Fyrru Krýnikubók sigur Bíblian okkum um ein mann, sum æt Jábez. Í teimum fyrstu níggju kapitlunum er ein rúgva av ættartalvum. Í hesum ættartalvum standa meir enn 600 nøvn, og mitt millum øll hesi nøvnini dregur Gud ein ávísan mann fram og gevur honum serligt uppmerksemi. Navn hansara var Jábez. Tað eru bara tvey vers um henda mann í allari Bíbliuni, og kortini fær hann eitt heiðurspláss millum tey 600 onnur nøvnini, sum nevnd verða í kapitlunum. Hví dregur Gud hann fram? Hvat avrikaði Jábez, sum gjørdi, at navn hansara skuldi minnast í yvir 4.000 ár? Hvat setti hann hægri enn allar hinar menninar? Tað skulu vit finna útav.

„Jábez var mætastur millum brøðra sína..." (vers 9). Hvat var tað, sum gjørdi hann so serligan? Hann tordi at biðja og líta á Gud í stórum viðurskiftum: „Jábez ákallaði Ísraels Gud við hesum orðum: 'Gævi tú vildi signað meg stórum og økt um land mítt og latið hond tína verið við mær og bjargað mær úr ógævu, so at mær verður einki at harmi!' Og Gud veitti honum tað, sum hann bað um."

Tað er Guds ynski, at vit skulu biðja um okkurt stórt! Gud segði við Jeremia: „Kalla á meg, og eg man svara tær og kunngera tær miklar og loyndar lutir, sum tú ikki kennir." Jer. 33,3. Paulus sigur, at Gud „... er mentur í øllum lutum at gera langt

út um alt tað, sum vit biðja um ella skilja." Ef. 3,20. Gud verður ikki móður av tær, hvussu ofta tú so enn biður, so fær nú undir at biðja um tað, tú ynskir – og lít á, at Gud vil geva tær tað – eftir sínum vilja!

Jábez líktist trúboðaranum Williami Carey, sum segði: „Vænta okkurt stórt frá Gudi og royn at gera okkurt stórt fyri Gud." Einki stendur um, at Jábez hevði serlig evni ella gávur. Bíblian sigur ikki, at hann var ríkur ella hevði góða útbúgving. Hann var bara ein vanligur maður við einari óvanligari trúgv. Tú skalt ikki gremja teg um tað, tú ikki hevur – um bara tú hevur trúgv!

Eitt annað áhugavert við Jábezi er, at hann helst hevur havt okkurt brek. Á hebraiskum merkir „jábez" „pínufullur". Mamma Jábez hevði so sterka pínu, tá ið hon føddi hann, at hon gav honum navnið „Pínufullur". Kanst tú hugsa tær at fara gjøgnum lívið við hasum navninum?

Kanska hevur hann verið óynsktur, og tey hava ikki elskað hann. Men hann var sterkari enn brek sítt, og trúgvin førdi hann víðari. Hann hugdi ikki eftir fortíðini, hann hugdi frameftir móti framtíðini. Hann trúði, at um Gud vælsignaði hann, so fór framtíðin at gerast størri enn fortíðin.

Hvat er títt brek? Er tað kropsligt? Ella andaligt? Er tað ein ólukkuligur barndómur? Er tað eitt ørkymlandi arbeiði ella eitt brotið hjúnalag? Uttan mun til, hvat ið tað er, so segði Jesus: „Alt er møguligt fyri honum, sum trýr." (Mark. 9,23).

*„...et Ord til Dagen"* - *Effie Campbell* umsetti.

# Statt á Guds orði

Forbønarløta skuldi vera á Kanal 10. Elisabeth Mork stílaði fyri henni, og hon hevði fingið ein mann at biðja saman við sær. Maðurin tosaði svenskt, men skilliga hoyrdist, at hann var finni. Elisabeth sigur so við hann: „Tú, áðrenn vit fara undir at biðja, kanst tú so ikki siga frá hasari hendingini, sum tú nevndi í talu tíni í áðni?"

„Jú, saktans," svaraði hann og fór undir at greiða frá. „Tað var ein evangelistur, sum virkaði í Týsklandi. Hann arbeiddi innan sjúkrahúsverkið. So fór hann inn á eina psykiatriska deild, og hetta var ein afturlatin deild. Millum sjúklingarnar

har var ein maður, sum var um 30 ára aldur. Hann hevði mest sum alt lív sítt verið á hesum sjúkrahúsinum. Hann dugdi hvørki at lesa ella skriva. Evangelisturin fór so undir at tala, og hann helt Bíbliuni í høgru hond, og fleiri ferðir í talu síni segði hann: „Tú mást standa á Guds orði!" Hvørja ferð, hann segði tað, lyfti hann armin við Bíbliuni upp og svingaði hann so niður móti knænum, sum fyri at undirstrika tað, hann segði: „Tú mást standa á Guds orði. Tú mást standa á Guds orði. Tú mást standa á Guds orði!"

Nakað eftir hetta kom evangelisturin aftur, og tá sær hann, at hesin maðurin er vorðin grøddur. Hann spyr hann so, hvussu hetta ber til. Maðurin svaraði: „Eg sá eina Bíbliu liggja her á deildini, og eg mintist tað, tú segði, at vit máttu standa á Guds orði. Eg tók Bíbliuna og blakaði hana á gólvið, og so steig eg upp á hana og rópti: „Gud, nú standi eg uppi á orði tínum, sum talarin segði, at vit skuldu gera." Í somu løtu bleiv eg grøddur."

Endin á hesi frásøgnini gjørdist tann, at hesin fyrrverandi sjúklingurin fór sjálvur at ferðast um í Týsklandi sum evangelistur. Tað at standa á Guds orði er ein máliska, sum verður brúkt millum trúgvandi fólk. Hon merkir sjálvandi ikki, at vit skulu stíga á Bíbliuna, men hon merkir, at vit skulu halda rimmarfast um Guds lyfti í Bíbliuni.

*Effie Campbell.*

---

Ein blaðmaður spurdi norska bispin Olav Skjevesland, hvussu norska kirkjan sær út um 20 ár. Hann svarar: „Ja, tann sum visti tað! Gud kann gera okkum ovfarin, tí Heilagi Andin er ikki útgingin upp á dato. Gud kann gera okkum ovfarin og senda okkum út á eina heilt nýggja breyt."

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 29. august | Tekstur: | Mark. 10,46-52 | bíbliuorð: | Mark. 10, 49b |
| 5. sept. | Tekstur: | Luk. 7,11-17 | bíbliuorð: | Luk. 7,22b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74